Kunngerðablaðið A
2017
Givið út 24. juli 2017

Nr. 114 24. juli 2017

**Kunngerð um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2017**
(Hækkaðar kvotur, uppboðssøla og vinnuligar royndir)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 146 frá 22. desember 2016 um at skipa fiskiskapin eftir norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2017 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2.** Føroyska kvotan av norðhavssild í 2017 er 125.597 tons."

**2.** Aftan á § 2 verður sett:

"**§ 2 a.** Av kvotuni, sambært § 2, verða 53.097 tons sett av til fiskifør undir føroyskum flaggi at fiska. Fiskiskapurin kann fara fram í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi, ES sjógvi og í NEAFC skipanarøkinum. Fiskiskapurin í ES sjógvi er avmarkaður til í mesta lagi 6.000 tons."

**3.** Í § 3 og í § 4, stk. 1 verður "sambært § 2" broytt til: "sambært § 2 a".

**4.** Í § 3 verður "9.320 tons" broytt til: "49.486 tons".

**5.** Í § 4, stk. 1 verður "680 tons" broytt til: "3.611 tons".

**6.** Í § 4, stk. 2 verður "68 tons" broytt til: "361 tons".

**7.** Aftan á § 4 verður sett:

"**§ 4 a.** Av kvotuni, sambært § 2, verður rætturin at veiða 53.000 tons av norðhavssild seldur á uppboði eftir ásetingunum í § 1 í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017. Fiskiskapurin eftir hesi kvotu kann fara fram í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC skipanarøkinum.

**§ 4 b.** Av kvotuni, sambært § 2, verða 6.000 tons sett av til vinnuligar sildaroyndir og verkætlanir á føroysku landleiðunum, sambært § 5 a. Kvotan verður latin skipum sum felagskvota.

**§ 4 c.** Av kvotuni, sambært § 2, verða 1.000 tons sett av til at nýta sum hjáveiða í fiskiskapi hjá føroyskum skipum eftir uppsjóvarfiski í føroyskum sjógvi.

**§ 4 d.** Eru líkindi fyri, at felagskvotan, sambært § 4, ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin hækka ella taka burtur ásetta hámarkið, ella loyva fiskiførum við loyvi sambært § 4 at fiska av hesum kvotum.
*Stk. 2.* Er kvota, sambært § 4 b, ikki latin, ella líkindi eru fyri, at kvotan, sambært § 4 c, ikki verður fiskað, kann landsstýrismaðurin loyva fiskiførum við loyvi sambært §§ 3 og 4 at fiska av hesum kvotum. Kvoturnar verða latnar fiskiførum í sama lutfalli og skipan og á somu leiðum sum í §§ 3 og 4.
*Stk. 3.* Við almennari fráboðan skal landsstýrismaðurin í góðari tíð, og í seinasta lagi 10 dagar áðrenn, boða frá avgerð um broytingar sambært stk. 1."

**8.** Aftan á § 5 verður sett:

"*Vinnuligar fiskiveiðiroyndir*
**§ 5 a.** Fiskimálaráðið kann eftir umsókn lata føroyskum fiskifari við veiðiloyvi lut í kvotu, ið er sett av til vinnuligar fiskiveiðiroyndir sambært § 4 b.
*Stk. 2.* Umsóknin skal vera Fiskimálaráðnum í hendi fyri 16. august 2017, kl. 12.00. Umsóknin skal lýsa endamál, tíðarætlan og kostnaðarætlan fyri royndunum, umframt upplýsingar um fiskifar, reiðskap, útgerð og leiðir.

*Stk. 3.* Fiskimálaráðið sendir umsóknir, ið lúka formligu krøvini í stk. 2, til Havstovuna ella onnur serkøn innan økið, sum lata Fiskimálaráðnum ummæli.

*Stk. 4.* Í viðgerðini og ummælum av umsóknum skal dentur serliga leggjast á menningarvirði og nýskapanarvirði í royndunum, umframt virðisøking av veiðuni."

**9.** Aftan á § 6 verður sett:

"*Fiskiskapur í íslendskum sjógvi og ES sjógvi*

**§ 6 a.** Tá fiskað verður í íslendskum sjógvi, skal skiparin, sambært § 26, stk. 2 í løgtingslógini, halda seg til tær reglur, sum galda fyri fiskiskap eftir norðhavssild fyri skip undir føroyskum flaggi í íslendskum sjógvi.

*Stk. 2.* Tá fiskað verður í ES sjógvi, skal skiparin, sambært § 26, stk. 2 í løgtingslógini, halda seg til tær reglur, sum galda fyri fiskiskap eftir norðhavssild fyri skip undir føroyskum flaggi í ES sjógvi."

**10.** § 26 verður orðað soleiðis:

"**§ 26.** Fiskifør, sum fiska sambært hesi kunngerð, skulu senda hesar fráboðanir til Vørn samsvarandi skjali 1:

1) Fráboðan um, at fiskiskapur byrjar. Tá farið verður í íslendskan sjógv, ES sjógv ella NEAFC skipanarøkið, skal fráboðanin sendast, í fyrsta lagi 6 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið kemur inn í íslendskan sjógv, ES sjógv ella í NEAFC skipanarøkið.
2) Skipið skal, hvønn fyrrapart áðrenn kl. 12 føroyska tíð, boða frá veiðu fyri undanfarna samdøgur. Fráboðanin skal sendast, sjálvt um eingin veiða er fingin.
3) Fráboðan um, at fiskiskapur endar. Tá farið verður úr íslendskum sjógvi, ES sjógvi ella NEAFC skipanarøkinum, skal fráboðanin sendast, í fyrsta lagi 6 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið fer úr íslendskum sjógvi, ES sjógvi ella NEAFC skipanarøkinum."

**11.** Í § 27, stk. 3 verður "§ 10" broytt til: "§ 5".

**12.** Skjal 1 í kunngerð nr. 146 frá 22. desember 2016 um at skipa fiskiskapin eftir norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2017 verður orðað sum ásett í skjali 1.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 24. juli 2017

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
løgmaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

**Skjal 1**

**“Skjal 1**

**Fráboðanir til Vørn**

Niðanfyri standandi fráboðanir skulu sendast Vørn í XML sniði umvegis heimasíðuna, www.vorn.fo, undir “talgild móttøka”. Fráboðanir kunnu eisini sendast umvegis heimasíðuna, www.vorn.fo, undir “fráboðanir”.

**1) COE - Fráboðan um, at fiskiskapur byrjar. Skal sendast, í fyrsta lagi 6 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið kemur inn í íslendskan sjógv, ES sjógv ella NEAFC skipanarøkið.**

**Fráboðanin skal hava fylgjandi tekst:**

| **Dataelement** | **Koda** | **Frágreiðing** |
|---|---|---|
| Fráboðan | TM | COE, fráboðan um, at fiskiskapur byrjar (Catch on Entry) |
| Raðnummar | SQ | Nummar á fráboðanini |
| Loyvisnummar | LC | Nummar á fiskiloyvi |
| Beinleiðis veiða | DS | Fiskaslag, sum beinleiðis veiða er eftir |
| Radio kallimerki | RC | Kallimerki hjá skipinum |
| IMO nummar | IM | IMO nummar á skipinum (um tøkt) |
| Túranummar | TN | Túrur hjá skipinum í hesum árinum |
| Skip | NA | Navn á skipinum |
| Skipari | MA | Navn á skiparanum |
| Havnarkenningarnummar | XR | Havnarkenningarnummar hjá skipinum |
| Veiðiøki | RA | Økið hagar skipið fer til fiskiskap |
| Breiddarstig | LA | Knattstøða (N/S breidd), tá fráboðanin verður send |
| Longdarstig | LO | Knattstøða (E/V longd), tá fráboðanin verður send |
| Veiða umborð | OB | Veiða umborð flokkað eftir fiskasløgum (FAO 3 alpha kodu). Veiðan skal gevast upp í rundari vekt í kg. |
| Dagfesting | DA | Dagfesting, tá fráboðanin er send (dd-mm-yyyy) |
| Klokkutíð | TI | Klokkutíð, tá fráboðanin er send í UTC (24M h:m) |
| Viðmerkingar | RE | Viðmerkingar |

**2) CAT - Veiðifráboðan hvønn dag. Tá fiskað verður, skal fráboðan sendast dagliga fyrrapartin áðrenn kl. 12 UTC.**

**Fráboðanin skal hava fylgjandi tekst:**

| Dataelement | Koda | Frágreiðing |
|---|---|---|
| Fráboðan | TM | CAT, veiðifráboðan (Daily Catch report) |
| Raðnummar | SQ | Nummar á fráboðanini |
| Loyvisnummar | LC | Nummar á fiskiloyvi |
| Beinleiðis veiða | DS | Fiskaslag, sum beinleiðis veiða er eftir |
| Radio kallimerki | RC | Kallimerki hjá skipinum |
| IMO nummar | IM | IMO nummar á skipinum (um tøkt) |
| Túranummar | TN | Túrur hjá skipinum í hesum árinum |
| Skip | NA | Navn á skipinum |
| Skipari | MA | Navn á skiparanum |
| Havnarkenningarnummar | XR | Havnarkenningarnummar hjá skipinum |
| Veiðiøki | RA | Økið har skipið er til fiskiskap |
| Breiddarstig | LA | Knattstøða (N/S breidd), tá fráboðanin verður send |
| Longdarstig | LO | Knattstøða (E/V longd), tá fráboðanin verður send |
| Veiða | CA | Veiða undanfarna samdøgur frá 00.00 til 23.59(CAT), flokkað eftir fiskasløgum (FAO 3 alpha kodu). Veiðan skal gevast upp í rundari vekt í kg. |

| | | |
|---|---|---|
| Samlað veiða umborð | TC | Samlað veiða umborð (FAO 3 alpha kodu), í rundari vekt í kg. |
| Dagfesting | DA | Dagfesting, tá fráboðanin er send (dd-mm-yyyy) |
| Klokkutíð | TI | Klokkutíð, tá fráboðanin er send í UTC (24H h:m) |
| Viðmerkingar | RE | Viðmerkingar |

**3) COX – Fráboðan um, at fiskiskapur endar. Skal sendast, í fyrsta lagi 6 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið fer úr íslendskum sjógvi, ES sjógvi ella NEAFC skipanarøkinum.**

**Fráboðanin skal hava fylgjandi tekst:**

| **Dataelement** | **Koda** | **Frágreiðing** |
|---|---|---|
| Fráboðan | TM | COX, fráboðan, at fiskiskapur endar (Catch on Exit) |
| Raðnummar | SQ | Nummar á fráboðanini |
| Loyvisnummar | LC | Nummar á fiskiloyvi |
| Beinleiðis veiða | DS | Fiskaslag, sum beinleiðis veiða hevur verið eftir |
| Radio kallimerki | RC | Kallimerki hjá skipinum |
| IMO nummar | IM | IMO nummar á skipinum (um tøkt) |
| Túranummar | TN | Túrur hjá skipinum í hesum árinum |
| Skip | NA | Navn á skipinum |
| Skipari | MA | Navn á skiparanum |
| Havnarkenningarnummar | XR | Havnarkenningarnummar hjá skipinum |
| Veiðiøki | RA | Økið hvaðani skipið kemur av fiskiskapi |
| Breiddarstig | LA | Knattstøða (N/S breidd), tá fráboðanin verður send |
| Longdarstig | LO | Knattstøða (E/V longd), tá fráboðanin verður send |
| Veiða | CA | Veiða, fiskað undanfarna samdøgur frá 00.00-23.59, flokkað eftir fiskasløgum (FAO 3 alpha kodu). Veiðan skal gevast upp í rundari vekt í kg. |
| Samlað veiða umborð | TC | Samlað veiða umborð (FAO 3 alpha kodu), í rundari vekt í kg. |
| Móttøkuhavn | PO | Havn har fiskurin verður uppskipaður/umskipaður |
| Landað ella umskipað | TR | Upplýs hvat virki ella skip veiðan verður landað ella umskipað til. |
| Dagur, tá veiðan verður landað ella umskipað | PD | Dagurin, tá mett verður, at veiðan verður landað ella umskipað (dd-mm-yyyy) |
| Klokkutíð har veiðan verður landað ella umskipað | PT | Tíð á degnum mett verður, at veiðan verður landað ella umskipað (24H h:m) |
| Dagfesting | DA | Dagfesting, tá fráboðanin er send (dd-mm-yyyy) |
| Klokkutíð | TI | Klokkutíð, tá fráboðanin er send í UTC (24H h:m) |
| Viðmerking | RE | Viðmerking |

“